## DAGSINS MEINING

# Friður á jørð

Jólini eru í hondum. Fyri hvørt ár, sum gongur, tykist tað, sum alt meira verður gjørt burturúr hesi høgtíð. Jólini eru høgtíðin, har familja og serstakliga børnini eru í miðdeplinum. Tað kann bert vera gott, men ikki skerst burt, at ein ávísur vandi er í øllum jólavasanum. Foreldur eru strongd, familjubúskapurin er strongdur og jólaboðskapurin hevur lyndi til at hvørva í meldrinum. Tað kann tí vera gott at steðga eitt sindur á at lata frið falla yvir sinnið og at hugsa eitt sindur um, hvat alt hetta snýr seg um.

Jólini snúgva seg um ein friðarboðskap og ein gleðiboðskap. Hugsa vit um støðuna í heiminum sum heild, so liggur tað tungt við friðinum. Hesir seinastu dagarnir hava verið teir blóðugastu í Irak, síðan innrásina. Ófriður, regional kríggj, yvirgangur, hungur og hall eru gerandiskostur í heiminum, nú vit halda jól. Hetta er ein døpur mynd og hon verður ikki ljósari av at hugsa um, at tað yvirhøvur eru børn, ið líða mest undir hesum viðurskiftum.

Men glottar eru eisini at hóma í myrkrinum. Í hesum døgum eru fimtan ár síðan, at friður fekst í Mocambique. Hesin friður hevur hildið og búskapurin blómar, hóast fólkaræði enn tíverri bert er eitt eiti. Vit kundu nevnt aðrar glottar við, men lat fara. Nóg mikið er at nevna, at tað tykist sum ST styrknar í hvørjum og alt meira tekur ábyrgd, har tað er neyðugt. Í hesum høpi skal verða mint á, at Føroyar nú fáa størri uttanríkspolitiskar heimildir. Vit eiga tí at átaka okkum størri ábyrgd, har tørvur er á neyðhjálp og stuðli til ST í kreppuraktum økjum.

Føroyar eru eitt av heimsins ríkastu londum og eiga vit at deila okkara ríkidømi við tey, sum minni hava. Vit kunnu ikki sita við góðari samvitsku mitt í okkara yvirflóð og líta at, meðan eit nú børn í túsundatali árliga doyggja í hungri. Latum okkum nýta jólahalguna til at hugsa um, hvussu eitt land sum Føroyar best kan hjálpa einum heimi í svárari neyð. Við hesum í huga kunnu vit fyrireika okkum til at taka ímóti gleðiboðskapinum um heimsins frelsara, sum varð borðin í heim í einum fjósi í Betlehem fyri meira enn tveytúsund árum síðani. Í Betlehem er lítil friður hesi jól og vit kunnu tí eisini í bønum okkara leggja eitt gott orð inn fyri hendan stað og alt Miðeystur, har ófriðurin og neyðin eru størri enn nakrantíð áður í søguni. Vit eiga samstundis ikki at gloyma at takka fyri, at vit kunnu liva í friði í her Føroyum. Hetta er ein stór og rík gáva, sum vit til dagligt kanska ikki geva okkum nógv far um. Við hesum orðum ynskja vit lesarum og viðskiftafólkum okkara eini gleðilig jól.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Svar til Finn Helmsdal

**Ragnar Magnussen**
*Nevndarlimur í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag*

**Í Sosialinum 21. desember og í Dimmu 21. desember hevði Finnur Helmsdal eina viðmerking, sum hann nevnir Høgni Hoydal og moralurin. Viðmerkingarnar tóku partvís støði í eykaflokstingi Tjóðveldisfloksins leygardagin 18. desember. Í viðmerkingini verður undirritaði eisini nevndur. Tí hesar viðmerkingar.**

Eitt av málinum, sum var til viðgerðar á Eykaflokstingi Tjóðveldisfloksins, var at seta eina útihýsingargrein í lógir floksins, sum gevur møguleika fyri at útlima ein lim, sum áhaldandi mótarbeiðir flokkinum og hansara virksemi. Ein av teimum fyrstu at taka orðið, tá ið hetta málið kom fyri, var Finnur Helmsdal. Og tað var ikki við mýkindum. Hann nevndi fleiri fólk við navni og skuldsetti tey m.a. at vera viljaleys amboð í hondum formansins. Røða Fins var so óndsinnað og ljót, at tærnar krimpaðu seg í skónum. Áhoyrararnir vóru í fyrstu atløgu lamslignir, men komu líðandi fyri seg og fóru at rópa buhh. Sjálvur hevði ikki ætlað at tikið orðið í hesum máli. Men aftaná røðuna hjá Finni mátti eg biðja um orðið. Tá ið eg so fekk orðið, spurdi eg heilt einfalt Finn, hvaðani hann bygdi sín politikk á. Eg helt fram og segði, at Finnur Helmsdal møtir ikki upp á limafundum, hann møtir ikki upp á aðalfundum, hann møtir ikki upp á floks- ella eykaflokstingum. Eg kann eisini leggja afturat her, at hann heldur ikki møtir upp á uppstillingarfundum. Eg haldi spurningurin er sera viðkomandi. Finnur váttar í sínum viðmerkingum, at so er. Finnur hevur eisini fyrr sagt, at stevnumið floksins kann hann heldur ikki taka undir við, tí tað er bara nakað formaðurin hevur skrivað. Skuldi tað hent, at Finnur møtir t.d. á eitt floksting, ja so er tað sum terna skýtst á egg. Altíð er tað ein hondbólts- ella fótbóltsdystur, sum hevur størri áhuga. So var eisini leygardagin 18. desember. Hann var so leingi, sum rokið, rumblið og splitið vardi, men tá ið poltikkurin kom fyri, var hann horvin.

Finnur Helmsdal kann gott siga, at eg og onnur eru viljaleys amboð í hondunum á formanninum. Hann livir í síni egnu verð, uttanfyri alt felags politiskt lív í Suðurstreymoy. Hann veit tí ikki, hvat fer fram, har sum limir floksin hittast. Hann er jú ikki har. Limir floksins hava ikki hansara áhuga. Hvar hann so tilevnar sítt politiska krotusmíð, veit eg ikki.

Finnur sigur, at øll onnur uttan hann eru viljaleys amboð í hondum formansins og gera bara tað, ið hann vil ella eftir boðum hansara. Her fer hann púra skeivur. Sum dømi um hetta, kann eg siga frá, hvat fór fram á uppstillingarfundi 21. september 2004 í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag. Hetta var uppstillingarfundur til býráðsvalið 9. november.

Í sambandi við býráðsvalið 2004 ynskti formaður floksins at seta ein løgtingslim í Suðurstreymoy á listan. Formaðurin boðaði nevndin frá hesum frammanundan, sum beint var. Nevndin í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag kundi tí viðgera spurningin fyri uppstillingarfundin, og var hetta eisini gjørt. Nevndin samdist at ganga í móti hesum ynski. Grundgevingarnar vóru fleiri. Á uppstillingarfundinum kom so formaðurin við uppskoti um at seta løgtingslimin á listan. Nevndin í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag gekk ímóti hesum og royndi at fáa fundarfólkið at taka undir við sjónarmiðum sínum. Formaðurin royndi hinvegin at sannføra fundarfólkið um, at tingmaðurin átti at vera á listanum. Nógv høvdu orðið, summi vóru fyri og onnur vóru ímóti. Fyrimunir og vansar vóru nevndir. Tað var tí trupult at meta um, hvussu samlaða niðurstøðan var. Semja var tí at niðurleggja fundin eina løtu og geva fólki høvi, óformelt at tosa saman, og aftaná skuldi so atkvøðast um spurningin. Tá ið fundurin varð uppafturtikin, varð atkvøtt um spurningin: 62% søgdu nei og 38% ja. Tað vil siga, at fundarfólkið tók undir við nevndini í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag og ikki formanninum. Soleiðis var hetta málið avgreitt, og havi ikki hoyrt um tað síðani. Øll virdu niðurstøðuna. Øll vóru samd um mannagongdina, og at avgerðin skuldi virðast. Soleiðis hevði neyvan verið, um Finnur var á fundinum. Hann hevði uttan iva sett spurningar fram, um nú mannagongdin var røtt, og hann hevði uttan iva farið í bløðini og sátt iva um úrslitið. Kanska ikki, tí formaðurin ikki fekk viðhald. Hjá Finni hevur sjálvt málið ongan týdning, men heldur um hann á ein ella annan hátt kann vinna formanninum neisur. Finnur veit sjálvsagt ikki av hesum, tí hann var, sum vanligt er, ikki á fundinum. Var hann á fundinum hevði hann neyvan tikið undir við einari skipaðaði gongd sum hesari, hvørs endamál er at greiða ósemjur, tí ósemjur, rumbul, illneiting er vørumerki hansara. Øll onnur hava rætt bara ikki formaður floksins, hvør hann so er.

### Hvør hevur valt Høgna Hoydal til formann

Finnur tikist at hava gloymt, hvør hevur valt Høgna Hoydal til formann floksins. Finnur er væl greiður um, at av teimum 48, sum hava valt Høgna Hoydal til formann, eru bara 8 tingmenn. Hini 40, sum hava valt Høgna til formann, eru álitisfólk í flokkinum kring landið. Sum ein av hesum fari eg ikki í framtíðini tigandi at góðtaka tíni persónligu álop á formann okkara. Bygnaður floksins er í fleiri liðum. Møguleiki er tí at loysa ósemjur í flokkinum, um vilji er til tess. Men bygnaður floksins er ikki avgerandi fyri, um ósemjur vera loystar ella ikki. Bygnaðurin er amboðið. Um demokratiskar avgerðir í teimum ymisku liðum floksins ikki vera virdar

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.